# Eru um at drukna í klagum frá sjúklingum og avvarðandi

**Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, hevur sett sær fyri at fáa skil á viðurskiftunum, tá ið føroyskir sjúklingar verða sendir uttanlands at fáa viðgerð**

NÝGGJ SJÚKRAHÚSLÓG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal skil og rættvísi fáast á viðurskiftunum, táið føroyskir sjúklingar verða sendir uttanlands at fáa viðgerð á sjúkrahúsi.

Tað er endamálið hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í heilsumálum. Tí vil hann nú hava Løgtingið at samtykkja eina nýggja sjúkrahúslóg.

– Málsøkið, sum eitur serviðgerð uttanlands hevur verið ógvuliga trupult at umsitið, ikki minst fíggjarliga.

– Samstundis hevur skipanin verið fyri ógvuliga hvøssum atfinningum bæði frá sjúklingum og teirra avvarðandi.

Hans Pauli Strøm sigur, sjúklingar og teirra avvarðandi sita mangan eftir við eini kenslu av, at mismunur verður gjørdur á sjúklingum og at tað er alt ov tilvildarligt, hvør sleppur at hava fylgjara við og, hvør sleppur ikki.

Hann sigur, at Almanna- og Heilsumálaráðið tískil er við at drukna í klagum frá sjúklingum og avvarðandi, sum ikki halda at tey hava fingið rættvísa viðferð afturímóti onkrum øðrum, sum hevur verið í somu støðu.



*Tað er ofta at sjúklingar og avvarðandi sita eftir við eini kenslu av, at mismunur verður gjørdur á sjúklingum og at tað er alt ov tilvildarligt, hvør sleppur at hava fylgjara við og, hvør sleppur ikki. Tað kann ikki halda fram, sigur Hans Pauli Strøm*

Ein orsøk til mismunur viðhvørt verður gjørdur á fólki, er at tað eru ikki nóg greiðar reglur á økinum.

– Í løtuni er tað mannagongdin tann, at tað er hvør einstakur yvirlækni, sum einaráðandi ger av, hvør skal sendast uttanlands í viðgerð og, hvør skal fáa fylgjara við.

– Hetta hevur ført við sær, at tað er ógvuliga ymiskt, hvussu farið verður fram, tí yvirlæknar kunnu sjálvsagt hava ymsa uppfatan av sjúklingum.

### Betri tamarhald á støðuni

Landsstýrismaðurin heldur at hendan støðan kann ikki halda fram, tí tað er alt annað enn nøktandi hjá sjúklingunum og teirra avvarðandi.

Samstundis krevur hetta ómetaliga nógva arbeiðsorku at viðgerða allar hesar kærurnar.

Hann sigur, at hesi seinastu árini kann tað eisini tykjast sum um at vit hava mist tamarhaldið á játtanini til serviðgerð uttanlands, tí nýtslan er vaksin so ómetaliga nógv hesi seinastu árini.

– Tí hevur politiski myndugleikin viðurkent, at tað verður neyðugt at fáa betri tamarhald á hesum øki.

Hans Pauli Strøm leggur dent á, at í gerandisdegnum vera tað framvegis teir ymisku yvirlæknarnir, sum einaráðandi skulu gera av, hvør skal sendast uttanlands í serviðgerð og tað vera framvegis eir, sum hava fakligu metingina av hvørjum einstøkum sjúklingum.

– Men harumframt er ætlanin at seta eina visitatiónsnevnd av fakfólki og einum umboði fyri sjúklingarnar, sum skal hava yvirskipaðu ábyrgdina av økinum.

Framyvir verður tað visitatiónsnevndin sendir sjúklingarnar uttanlands, men í dagliga arbeiðnum letur hon hesa heimildina upp í hendurnar á yvirlæknunum.

– Uppgávan hjá visitatiónsnevndini verður at gera yvirskipaðar leiðreglur fyri alt økið. Í hesum sambandi skal nevndin siga, hvørjar viðgerðar vit eiga at fáa heim til Føroyar og, hvørjar viðgerðir kunnu veitast uttanlands. Hon skal eisini átaka sær at gera avtalur við útlendsk sjúkrahús fyri at vita, hvar vit fáa bestu og bíligastu viðgerðina.

– Eitt, sum visitatiónsnevndin skal gera, er at áseta, at eitt ávíst sjúkrahús uttanlands skal nýtast til eina ávísa viðgerð. Men hon skal eisini gera av, at sjúkrahúsverkið ikki kann bjóða eina ávísa viðgerð, tá ið tað ikki er vísindaliga prógvað, at viðgerðin grøðir. Visitasjónsnevndin kann eisini gera reglar fyri, nær ein sjúklingur hevur rætt til at fáa fylgjara við í sambandi við viðgerð uttanlands.

Somuleiðis eigur visitatiónsnevndin eisini hava skil á, at sjúklingar ikki verða sendir uttanlands, sum einsvæl kunnu fáa viðgerð í Føroyum, uttan órímliga langa bíðitíð.

– Tað eru dømi um, at sjúklingar eru sendir uttanlands, hóast teir einsvæl kundu verið viðgjørdir á einum av teimum trimum sjúkrahúsunum í Føroyum innan fyri rímiliga bíðitíð.

### Siðsemiligur spurningur

Hans Pauli Strøm leggur kortini dent á, at tað eftir hansara tykki kann tað ikki koma upp á tal, at henda visitatiónsnevndin fer at forða sjúklingum í at fáa viðgerð.

– Eftir mínum tykki er tað óhugsandi, at vit fara ikki at koma i ta støðu, at visitatiónsnevndin fer at koma til ta niðurstøðu, at onkur ávís viðgerð er so dýr, at hana vil føroyska samfelagið ikki bjóða einum sjúklingi.

Hann ásannar, at tað eru viðgerðir, sum eru ógvuliga dýrar. Men tað er altíð ein politisk raðfesting, hvussu nógv skal brúkast til serviðgerð uttanlands.

– Hetta er ein siðsemiligur spurningar og eg vænti at í slíkum førum má politiski myndugleikin taka ábyrgdina, tí tað er altíð politiski myndugleikin, sum altíð hevur evstu ábyrgdina, sigur Hans Pauli Strøm.

Og hann leggur afturat, at tað fer ikki at vera ein fíggjarligur spurningar um ein sjúklingur verður sendur uttanlands í serviðgerð, ella ikki.

Hinvegin eigur visitasjónsnevndin tí at fylgja við nýtsluni á játtanini til serviðgerð uttanlands.

– Og er tørvur á tí, eigur hon at heita á landsstýrismannin um at taka eina politiska avgerð, sigur Hans Pauli Strøm.

# Sjúklingar koma í eina sterkari støðu

**– Sjúklingarnir á føroysku sjúkrahúsunum fáa nú betri møguleika fyri at gera vart við seg og at føra síni sjónarmið fram**

NÝGGJ SJÚKRAHÚSLÓG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skulu sjúklingarnir, sum koma í holt við sjúkrahúsini í Føroyum, fáa betri umstøður at gera vart við seg, tá ið okkurt er, sum teir eru ónøgdir við, ella okkurt er, sum teir halda eigur at verða øðrvísi og betri.

Tað er eitt endamál við nýggju sjúkrahúslógini, sum nú er til viðgerðar í tinginum.

Í løtuni hevur hvørt sjúkrahús eitt fimm mannað sjúkrahúsráð. Tey eru ráðgevandi, men tey hava ongan myndugleika.

– Hetta eru ráð, sum umboða sjálvt sjúkrahúsið, men tá ið tey ongan myndugleika hava, hava tey heldur ongan veruligan leiklut, sigur landsstýrismaðurin.

Tí ætlar Hans Pauli Strøm sær nú at umskipa tey, so at tey fáa ein veruligan leiklut.

### Talirør fyri sjúklingin

Sostatt er ætlanin at tað nú skal veljast eitt sjúklingaráð við níggju limum. Trý umboð skulu veljast fyri hvørt av teimum trimum sjúkrahúsunum.

Samstundis fær ráðið eitt nytt innihald, tí nú skulu tey verða umboð fyri sjúklingarnar, har ráðini fyrr umboðaðu sjúkrahúsini.

– Sjúklingaráðini skulu hereftir verða talirør hjá sjúklingum og røkja teirra áhugamál mótvegis sjúkrahúsunum og mótvegis politiska myndugleikanum.

Tað merkir, a sjúklingaráðið kann venda sær til politiska myndugleikan og sjúkrahúsini við ynskjum og krøvum hjá sjúklingum.

– Eitt nú kann sjúklingaráðið seta krøv til politiska myndugleikan og sjúkrahúsini og krevja øðrvísi raðfestingar, eitt nú um hvørjar sjúkuviðgerðir, eiga at vera á sjúkrahúsunum o.s.fr.

Hann sigur, at spurningurin um mammografi og uppvenjing eftir sjúku, eru tvey dømi um mál, sum eitt slíkt sjúklingaráð kundir arbeitt við og har tað kundi gjørt sína ávirkan galdandi. Samstundis kunnu sjúklingar, sum hava okkurt at finnast at á sjúkrahúsunum, venda sær til sjúklingaráðið og biðja um at málið verður tikið upp.

### Nógv størri slagkraft

Hans Pauli Strøm heldur, at sjúklingaráðið, sum er felags fyri alt landið, fær nógv størri slagkraft.

– Tað eru nógv sjúklingafeløg kring landið sum hvør í sínum lagi samskifta við landsstýrismannin. Hereftir skal alt tað samskifti ganga ígjøgnum tað felags sjúklingaráðið, tí mangan eru trupulleikarnir felags, sigur Hans Pauli Strøm.

Eitt nú hava heilafelagið, apopleksifelagið, giktafelagið og kanska onnur við, ein yvirskipaðan felags áhuga, sum eitur uppvenjing, tó at uppvenjingin er ymisk fyri hvønn bólk.

– Í løtuni samskifta hesi feløgini hvør í sínum lagi við landsstýrismannin. Men arbeiða tey ígjøgnum sjúklingaráðið, kunnu krøvini samskipast og tað hevur størri ávirkan, heldur Hans Pauli Strøm.